
Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður skrivar:

Góður liberalur og borgarligur politikkur at tað almenna skal fíggja tollin í 80 dagar



Landsstýrið ger alt tað er ment fyri at bøta um búskaparligu støðuna í landinum. Gloppið millum útflutning og innflutning er framvegis ov stórt og undirskotið á gjaldsjavnanum og andilsjavnanum er eisini ov stórt.

Fyri at bøta um hesa støðu hevur landsstýrið avgjørt at fremja ymisk tiltøk, sum avmarkað nýtsluna og innflutningin. M.a. er møguleikin fyri tollkredittí skerdur.

Hetta skrivar Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður í politisku viðmerkingini í dag

politisk viðmerking

Dagblaðnum likt, so kunnu teir ikki lata vera við at leita fram sosialistaskrímslið, tá tað verður gingið handilslívinum ov nær. Men er tað liberalur politikkur at duva uppá kreditt úr landskassanum í mánað eftir mánað, spyr Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður

Í nógv ár hevur tann skipan verið galdandi, at stórir innflytarar hava kunnað fingið kreditt á Gjaldstovuni, soeiðis at teir umframt tann mánaðin teir fáa vøruna, eisini hava fingið kreditt í ein mánað og tjúgu dagar afturat. Sostatt verður samlaði kreditturin at fevna um 80 dagar.

Tá hetta landsstýrið kom til varð beinanvegin tosað um at stramma henda kredittin, og tað er so hent nú.

Landsstýrið hevur avgjørt at stytta hesa umrøddu kreditt-tíð úr tveimum mánaðum og tjúgu døgum niður í ein mánað og tíggju dagar.

Nú er so Dagblaðið í luftini.

Á forsíðuni í gjár stendur stór grein við yvirskriftini: »Større yvirflóð í landskassanum — nú streymar inn í landskassan«. Og í oddagreinini á síðu 2 verður m.a. sagt: »Uttan iva liggur tann vanligi sosialistiski fíggindaskapurin móti føroyskum handilslívi og fyritøkum aftanfyri hesa stramming av tollkredittinum. Tað hevur altíð erið uppgáva teirra vinstrahallu at vilja fría handlinum til lívs og henda neis er bert hin nýggjasta í eini rød av líknandi slag í hesum landsstýrisskeiði.«

Tá tosað verður um frían handil er tað so ikki í mótstríð við liberalan og borgarligan politikk, at tað almenna skal liggja og fíggja tollin í heilar 80 dagar?

Best sum øll vita, at búskaparliga støðan hjá Føroyum hevur verið út av lagi vánalig. Gloppið ímillum útflutning øðrumegin og innflutning hinumegin er alt ov stórt. Tað hevur ført til vaksandi undirskot á handilsjavnanum og gjaldsjavnanum, og fyri at minka um hetta gloppið, hevur landsstýrið so avgjørt at fremja ymisk tiltøk, sum avmarka nýtsluna og innflutningin.

Eitt av tiltøkunum er at stýra tollkredittinum á Gjaldstovuni.

Hetta er liður í arbeiðinum at venda búskaparligu gongdini. Tað er givið, at tað átti at minka um nýtsluna at møguleikarnir fyri tollkredittí verða skerdir.



Brúkarin rindar aftur hesaferð

verður sonevndi tollkreditturin minka
merkir vist, at tað skotbrá, sum heil
ndlar og aðrir innflytarar hava fingið
lmenna,áðrenn teir hava fyri neyðini at g
ll av innloystari vøru, verður stytt.
Áður fingu innflytarar verandi mán
gar í viðbót til at gjalda toll í. Nú
arskeiðið stytt niður í mánaðin og 40
Tað merkir sjálvandi, at handlarn
undið landið úr sær fyri at ska
neyðuga peningin til at gjalda munin
ir 80 og 40 dagarnar.
Miljónir eru sostatt lyftar inn um ski
jaldstovuni hesar seinastu dagarnar.
assin hevur fingið fleiri miljónir til
nars. Har flýtur yvir, sum er, tí øll er
lda hesa eyka inntøku hjá tí almenn
enn hevur fingið álagt av samgong
nntøkan skal brúkast til.

Uttan iva liggur tann vanligi sosialistiski
ggindaskapurin ímóti føroyskum handilslívi
-fyritøkum aftan fyri hesa stramming av
llkredittinum. Tað hevur altíð verið uppgáv
eirra vinstrahallu at vilja fría handlinum
lívs, og henda neisin er bert hin nýggjasta í ein
ð av líknandi slagi í hesum landsstýrisskeiði.
Men tað, teir vinstrahallu, gloyma hvør
(við vilja sum oftast) er, at handilssk
l loysa seg ella leggjast niður. Eitt og
rkandi tiltak, hvør fótongul og hvørt
løgd verða um føturnar á fría handlinu
bert verða goldið av brúkaranum
niga føroyinginum, sum nú noyðist at
kakostnaðin, sum kann standast av hest
jasta darvandi inntrivi úr Tinganesi.
kuldi tað hent, at vørurnar dýrka
avum, hava teir vinstrahallu flokka
góða umbering aftrat til at illneitast i